


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# FAS skipanin er ikki nøktandi



JOHAN DAHL
Løgtingsmaður
Sambandsflokkurin

Sum sjóvinnutjóð við hópin av vælútbúnum navigatørum, maskinmeistarum, dekkarum, hovmeistarum/kokkum, inspektørum í handilsvinnuflotanum, mugu vit skapað bestu karmar fyri hendan part av vinnu okkara.

Eg torið at siga at her hava vit føringar ikki verið dugnaligir nokk at skapað karmar og fortreytir.

Vit hava nú í mong ár havt FAS skipanina, sum skuldi verða ein skipan sum skuldi tiltrekkja útlendsk skip at skrásetað seg her, men skipanin er ikki nøktandi og tí fara skipini eisini úr aftur skránni, tá reiðaríini hava funnið útav at skipanin ikki er nøktandi til teirra ..

Hetta kunnu vit ikki brúka til nakað og tí er umráðandi at fáa sett eina DIS líknandi skipan í verk í Føroyum onganti ov skjótt annars missað vit henda vinnumøguleika av hondum.

Arbeiðast má við at fáa marknaðarført Tonnasjuskattaskipanina og betra hana um neyðugt og at fáa reviderað FAS soleiðis at vit eru á sama støði sum okkara grannar og helst betri.

Hetta vil tilføra nýggj arbeiðspláss, geva hópin av arbeiði til eftirlitisfólk, skipasýn umsiting av skipum osfr.

Okkara skráseting og skattaskipan innan handilsflotavinnuna kann bleiv ein vinnarasak um vit bera okkum rætt at Sambandsflokkurin vil virkað fyri at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Vel Sambandsflokkin tann 19. Januar - vit eru flokkurin fyri tey sum vilja framá og mennað land og fólk - vit eru tín flokkur.

# Hey tit UNGU! Bara OYN atkvøddi ímóti!



BILL JUSTINUSSEN
Miðflokkurin

Hevur tú nýliga fingið koyrikort? So ert tú í einum serligum vandabólki, sum "teir gomlu menninir" á Løgtingi hevur sett teg í. Tí tú verður í nýggju STIGASKIPANINI (klippikortskipanini) harðari revsaður enn tey, sum hava havt koyrikort í fleiri ár. Hví tað? Hví ikki øvut? Sum nýggjur bilførari vantar tær royndir, og tí er nógv skjótari hjá tær at "koma til" at gera eitt lógarbrot eftir nýggju ferðslulógini. Og lógarbrot verða ikki altíð gjørd við vilja. Fleiri av lógarbrotunum í nýggju stigaskipanini eru av slíkum slagi, at ein nýggjur bilførari lættliga kann gerast lógbrótari uttan at vilja tað.

Tí er tað botn-órættvíst móti tykkum ungu at revsa tykkum harðari, tí júst royndirnar skapa ein betri bilførara. Og royndirnar fær man bara við at koyra. Og skulu krøv setast, mugu tey setast til tey við royndunum. So her er alt øvut. Tey ungu eru gjørd til syndabukkar fyri ferðsluóhapp, hóast ongi hagtøl tala fyri hesum. Ongi hagtøl vísa nevniliga, hvussu nógvar ferðir meiri ein ungur er á vegnum enn ein eldri. Um ein ungur er 20 ferðir meiri í bilinum enn ein eldri og bara fremur 5 ferðir so nógv óhapp, so er tað í veruleikanum tann eldri, sum hevur trupulleikan. Hetta leggja teir, sum valda, onki í. Men tað geri eg og vil virka fyri at broyta hetta órættvísið eftir komandi val.

Eg var tann EINASTI, sum atkvøddi ímóti nýggju stigaskipanini, tí eg hugsaði um tykkum, sum eru ung. Hugsa tit um meg, so kunnu vit saman avrika nógv.

# Nú má handlast



SÚSANNA MORTENSEN
Sjálvstýrisflokkurin

Alsamt vaksandi tørvur er á sjúkrarøktarfrøðingum í heilsuverkinum. Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya bjóðar eina útbúgving á altjóða støði, Bachelor of Science in Nursing. Bert eitt hold á 22 lesandi verður tikið inn um árið, hóast vit hvørt ár hava 50 umsóknir og meir. Skúlin hevur gjørt avvarðandi myndugleikar varugar við, at við neyðugari fígging ber til at fara undir at taka tvey hold inn.

Kanningar í USA og Noregi hava víst, at røktarstarvsfólk við sjúkrarøktarfrøðiútbúgving tryggja sjúklingum á sjúkrahúsum: betri sjúkrarøkt og – viðgerð, styttri innlegging, betri útlit fyri heilsubót, færri langtíðar fylgjur av sjúkuni og ikki minst hægri yvirlivilsisprosent!

Vit hava ikki ráð at hyggja at uttan at gera nakað við støðuna, nú vit síggja tørvin á sjúkrarøktarfrøðingum ávirka umstøðurnar hjá sjúklingum. Neyðugt er at útbúgva fleiri sjúkrarøktarfrøðingar nú. Samstundis er eisini neyðugt at hyggja at teimum arbeiðskorum, sum sjúkrarøktarfrøðingar og onnur starvsfólk í heilsuverkinum hava.

Her mugu vit eisini hyggja at teimum møguleikum, sum leiðslurnar í Nærverkinum og á sjúkrahúsunum hava fyri at gera nakað munagott fyri arbeiðsumhvørvi og menning. Visjón 2015 tosar um at útvega, fasthalda og menna skikkað starvsfólk, men tað skal raðfestast á fíggjarlógini, um vit skulu síggja nakað úrslit!

Uppskot til kunngerð um ískoytisútbúgving til Bachelor í sjúkrarøkt liggur í Mentamálaráðnum, og skúlin hevur fyrireikað seg til at fara undir hesa útbúgving so skjótt, sum semja er um fíggingina av útbúgvingini.

Mentamálaráðharrin hevur givið Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar lyfti um at farast skal undir útbúgvingina sum skjótast.

Eg vil arbeiða fyri, at fleiri sjúkrarøktarfrøðingar verða útbúnir og at farið verður undir ískoytisútbúgvingina.

Veljið væl skikkað heilsuverk

Veljið Sjálvstýrisflokkin

Veljið Lista D

# Nullhugsjónin í ferðsluni



RODMUNDUR NIELSEN
Fólkaflokkurin

Tað tykist 0 áhugi fyri nullhugsjónini millum valevnini.

Hetta, hóast ein frágreiðing fyri og onnur eftir áminnir okkum um álvarsomu støðuna í ferðsluni.

Hetta, hóast ferðsluvanlukkur kosta alt ov nógv mannalív árliga, og kosta Føroyum í miðal slakar 200 milliónir kr. um árið.

Gloymdi áhugin er ein syrgulig staðfesting av líkasælu sum alt ov ofta kemur til skjóndar tá íð egin áhugamálini verða tikin fram um hvørji tiltøk gagna samfelagnum og tí einstaka menniskjanum.

Í alt ov stóran mun hevur líkasæla rátt í hesum øki, og tí eiga vit politiskt, at miðað verður eftir í framtíðini:

At eingin skal doyggja ella fáa álvarligt mein av ferðsluvanlukku í vegaflutningsskipanini.

At alt virksemi, sum hevur við ferðslu at gera, skal vera í samljóð við hetta stavnhaldið.

Vit í Fólkaflokkinum ynskja at varpa ljós á hendan verunleika, og ynskja at politisku flokkarnir í størri mun enn higartil seta nullhugsjónina á dagsskrá.

# Mentan – ein góð søluvøra



HANNA JENSEN
valevni fyri Fólkaflokkin

Hvat er tað sum ger, at eitt land verður kent? Er tað ikki næstan altíð okkurt, sum hevur við tess mentan at gera? Hugsa um Írland og U2 ella onkran av teirra mongu kendu rithøvundum. Hugsa um Danmark og H.C. Andersen ella Søren Kierkegaard. Hugsa um Pólland og filmsskparanar Kieslowski og Wajda og dømini eru óendaliga mong.

Tá tað kemur til Føroya, so er tað húgvan hjá Jens Martin Knudsen, Barbara eftir Jørgen-Frantz Jacobsen, Lena,Teitur og Eivør, S. J. Mikines og Ingálvur av Reyni, Guðrun og Guðrun og mong onnur, sum gera okkara oyggjar kendar. Hesi eru øll umboð fyri føroyska mentan hvør á sínum øki. Og mentan er ein dýrt keypt vøra, sum gevur fleirfalt aftur tað, sum verður lagt í hana.

Mentan er ein góð søluvøra, sum vit gera rætt í at leggja okkum eftir at marknaðarføra nógv meiri. Tí at so marknaðarførir hon Føroyar

Les meiri á: homepage. mac.com/hannajensen